


*Við Matt Damon í høvuðsleiklutinum fekk Jason Bourne eina endurreisn á hvíta løriftinum. Ludlum, sum upprunaliga skapti Bourne, er deyður, men Eric Van Lustbader ber arvin víðari til action-tysta lesaran*

# Tá Bond líkist einum dukkufreti

**Jason Bourne er um nakað enn meira fantastiskur enn James Bond. Harðari, kaldari, dugnaligari og ikki minst munandi meira spennandi**

BÓKMENTIR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jason Bourne, sum í veruleikanum er David Webb, var upprunaliga ein amerikanskur offiserur í Fjareysturi. Hann virkaði sum serfrøðingur hjá amerikanska herinum í Phnom Penh, høvuðsstaðnum í Cambodia, og saman við Dao og børnunum, Joshua og Alyssa hevði hann bygt sína tilveru.

Alt broyttist tó, tá ein vietnamesiskur pilotur skeyt Dao og børnini. Webb gjørdist frá sær sjálvum, og skjótt var hann Delta One, limur í Medusa, sum var loyniliga herdeildini hjá USA. Ein herdeild, sum uttan fyrilit snigmyrdi, rændi og saboteraði fyri amerikonsk áhugamál handan fíggindans verjugarðar.

Tann veruligi Jason Charles Bourne var eisini partur av Medusa, men tá hann tann 25. mars í 1968 varð avdúkaður sum dupultagentur, meðan hann uppgav støðuna hjá herdeildini til fíggindan, varð hann skotin á staðnum av Delta One – alias David Webb.

Tað var CIA-ovastin, Alex Conklin, sum skapti Delta One úr sálarligu restunum av David Webb, og tað var eisini hann, sum síðani brúkti Delta One til at jagstra Ilich Ramírez Sánchez. Heimsins vandamesta leigudrápsmann, ið eisini var kendur sum Sjakalurin.

Samleikin hjá Jason Bourne varð endurskaptur. Delta leyp ein

## Bourne-bøkurnar

**The Bourne Betrayal er fimta bókin í røðini um Jason Bourne, sum er umsett til danskt. Hinar fýra eru hesar**

*The Bourne Identity*
(*Manden uden navn*)
Her byrjar søgan um Bourne. Ein ókendur maður verður skolaður upp á land í Port Noir. Hann er meira deyður enn livandi, men ein drukkin bretskur lækni bjargar tó lívi hansara. Maðurin hevur púrasta mist minnið, men hann dugir at berjast, og hann tosar fleiri orientalsk mál flótandi. Hartil hevur hann nummarlykilin til eitt sveitsiskt kontonummar innopereraðan undir húðini. Spakuliga fer maðurin at finna fram til, hvør hann í veruleikanum er.




*The Bourne Supremacy*
(*Bourne duellen*)
Upprunaligi Jason Bourne hevur langt síðani tikið seg aftur, men í Macao er ein nýggjur leigudrápsmaður farin at gera um seg. Hann kallar seg Jason Bourne, og teknikkirnir, sum hann nýtir, eru teir somu, sum hjá upprunamanninum. Einasti maðurin, sum kann steðga honum, er sjálvandi veruligi Jason Bourne, men tað krevur ikki serliga penar snildir at fáa hann í tænastu aftur.




*The Bourne Ultimatum*
(*Bourne komplottet*)
David Webb hevur í fleiri ár undirvíst í orientalskari søgu á lærdum háskúla. Loynidómurin um Jason Bourne er nakað, sum bert tey nærmastu vita um, men onkur leki hevur verið í CIA. Carlos hevur funnið útav, hvør fjalir seg handan Jason Bourne, og nú vil Carlos eina ferð með alla staðfesta, hvør er tann størsti. Og so er seinasti dysturin millum tær báðar gomlu kempurnar farin ígongd.

